# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Ferðsluóhapp við innkoyringina til Hósvíkar

FERÐSLA
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tá sá heldur ógvusligt út, men tíbetur hendi bert avmarkaður fólkaskaði, tá eitt ferðsluóhapp hendi við innkoyringina til Hósvíkar um 17-tíðina í gjár.

Ein bilur við trimum monnum í, og sum var norðureftir á leið, skuldi snara inn til bygdina. Áðrenn hann kom so langt, varð hann árendur aftanífrá av einum øðrum bili, ið somuleiðis var á veg norðureftir.

Tann fyrri bilurin holdvist, og neyðugt varð hjá løgreglu og sløkkiliði at skera eitt av ferðafólkunum leyst.

Hetta ferðafólkið varð síðani flutt til kanningar á Landssjúkrahúsinum.



*Stóra »rugbreyðið« varð slongt bæði runt og holvdist í vanlukkuni. Neyðugt varð at skera eitt av ferðafólkunum leyst*



*Hvørgin bilurin fekk stórvegis skaða í óhappinum, sum tíbetur spældi væl av*




Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · tel: 588880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo

Fólk søkist til verkstaðið

**Vegna økt virksemi søkir Bilrøkt eftir fólki at arbeiða á verkstaðnum.**

**Starvið fevnir um:**
Reingerð av akførum v.m.

**Førleikakrøv:**
Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva.
Skal vera kundavinarlig/-ur og hava góðan røkjuskap. Koyrikort krevst.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi arbeiðspláss í menning. Løn eftir avtalu.

**Bilrøkt**
Ivaleyst størsta arbeiðsøkið hjá Bilrøkt er bilvask. Tað var eisini júst bilvask, ið var grundarlagið undir fyritøkuni, tá ið Bilrøkt bleiv sett á stovn.

Bilrøkt er eisini farið undir at hava bilverkstað, sum ger smærri uppgávur.

Vit skifta bremsur, útstoyt o.a. Eisini hava vit nýmótans dekk- og avbalanseringmaskinur.

Bilrøkt hevur í dag 3 flutningsbilar sum eru standby 24 tímar um døgnið, at hjálpa kundum, sum eru komnir illa fyri við bili sínum.

Eitt stórt virkisøki hjá Bilrøkt í dag eru leigubilarnir. Bilrøkt hevur lagt seg eftir at hava góðar og bíligar leigubilar, har kundin kennir seg tryggan við bilin.

Bilrøkt selur eisini brúktar bilar hjá sær sjálvum og fyri kundar.

BILRØKT
*Borgar fyri góðsku...*

ICELANDIC FISHERIES EXHIBITION 2008
Smárinn, Kópavogur, Iceland
2-4 October 2008

Kom og uppliva spennandi fiskarí ráðstevnu saman við okkum

**Við 62°N travel beinleiðis til ICEFISH ráðstevnuna sum verður hildin í Kópavogi 2.- 4. oktober 2008.**

**Ferðaætlan:**
Føroyar-Reykjavík 1. okt. 2008 kl. 08:00
Reykjavík-Føroyar 4. okt. 2008 kl. 22:20

Kostnaður fyri hvønn, íroknað flogferð v/ferðaavgjøldum, flutning millum flogvøll og innivist v/morgunmati:

Nordica Hotel
Einakamar ...... kr. 11.950,- fyri hvønn

Hotel Plaza
Einakamar ...... kr. 8.700,- fyri hvønn

Avlýsingartrygging kann teknast fyri 3% av ferðakostnaðinum, sum dekkar við sjúku-/deyða áðrenn fráferð. Les meira um tryggingartreytir á www.trygging.fo.

Bílegging á 62°N - tel. 340000 ella fjola@62n.fo.

Les meira á www.icefish.is

62°N travel

Hoydalsvegur 17 · 100 Tórshavn
Vágar Floghavn · 380 Sørvágur
Tel: 34 00 00 · booking@62n.fo